Røktar- og umlættingarheimið
Lágargarður

Lýst verður eftir

sjúkrahjálparum/ heilsuatstøðinum

í kvøld- og náttarvaktir, til setan frá 1. sept. ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er 0,7 ella 28 tímar um vikuna, kann eisini vera 0,5 ella 20 tímar um vikuna.

Lønin er sambært galdandi sáttmála.

Virkislýsingar eru til størvini.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja tlf. 316788.

Umsóknir við neyðugum prógvum skulu sendast til
Leiðaran á Lágargarði
Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er til mánadagin 24. juni 2002.

Kunngerð

frá útskiftingarnevndini í Bø

Útskiftingin innangarðs av Bíggjar bygd varð endað við úrskurði sagdur á fundi í Bø 4. juni 2002. Hesin úrskurður varð latin til ákæru frá sama degi sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Sorinskrivaran, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, ið er formaður í yvirútskiftingarnevndini.
Kærufreistin er 3 mánaðir frá 4. juni at rokna.

Á sama fundi var metingin av kommunalu ognartøkuni latin til ákæru sbrt. § 4 í ognartøkulógini frá 07.05.1881.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Sorinskrivaran, C. Pløysensgøta 1, Tórshavn, ið er formaður í yvirmetingarnevndini.
Kærufreistin er 3 mánaðir frá 4. juni at rokna.

Útskiftingarskjølini og metingin liggja frammi hjá kommununi í Bø og á Matrikulstovuni í Tórshavn, til kærufreistin er úti.

Øssur A. Midjord
útskiftingarformaður

Brúktur BMW 523i

bilurin er í sera góðum standi

BMW 523i
Árg. 03/96 km.108.00 kr. 280.000,-
Nýprísur í 1996 ca. 510.000,-
Bilurin er í sera góðum standi.
Bilurin hevur nógva orginala eykaútgerð, so sum Anti spin, klima aut., 6xcd boks, fjarst. sentrallás, sleipi krók, tvi deilt setur aftan, ski posa, alu felgur og eyka sett av felgum v/dekkum v.m.
(eyka útgerð fyri ca. 110.000,-)
Bilfriðkan
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

Sosialurin

Ársroknskapur 2001

Rakstrarroknskapur

1000 kr.	2001	2000
Rentuinntøkur v.m.	22.370	19.685
Rentuútreiðslur v.m.	9.028	7.262
etto rentuinnt ur	**13.3 2**	**12. 23**
Vinningur av partabrøvum	83	61
Kostnaður og provisjónsinntøkur	1.777	1.547
etto rentu- og ostna arinnt ur	**15.2 2**	**1 . 31**
Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra	296	652
Aðrar vanligar inntøkur	230	160
rslit av f gg arpostu	**15.728**	**1 .8 3**
Útreiðslur til starvsfólk og umsiting	10.213	9.286
Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum	1.004	961
Aðrar rakstrarútreiðslur	116	123
Tap og burturleggingar	2.401	1.974
rslit av vanligu ra stri	**1.99**	**2. 99**
Aðrar óvanligar inntøkur / Andre ekstraordinære indtægter	0	0
Aðrar óvanligar útreiðslur / Andre ekstraordinære udgifter	0	0
rslit av vanligu ra stri undan s atti		
rdin rt resultat f r s at	**1.99**	**2. 99**
Skattur	662	521
rs rslit	**1.332**	**1.978**
ti av ra strar rsliti		
Ársúrslit	1.332	1.978
Flutt frá undanfarnum árum	31.846	29.868
Flutt frá øðrum grunnum	116	123
Til n tslu	**33.29**	**31.9 9**
Flutt til grunnar	116	123
Framflutt úrslit	33.178	31.846
Tilsa ans	**33.29**	**31.9 9**

Fíggjarstøða 31. desember

1000 kr.	2001	2000
gn		
Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum	6.979	5.821
Ogn hjá fíggjarstovnum	62.577	18.138
Útlán	224.316	217.627
Lánsbrøv	64.039	59.787
Partabrøv	516	594
Ítøkiligar ognir	3.868	4.176
Aðrar ognir	0	40
Tíðaravmarkingar	363	110
gnir tilsa ans	**3 2. 58**	**3 .293**
uld		
Skuld til fíggjarstovnar og tjóðbankar	4.896	1.151
Innlán	320.412	269.277
Onnur skuld	1.305	1.158
Tíðaravmarkingar	9	0
Avsetingar til skyldur	800	843
ginogn		
Ábyrgdarapeningur	858	818
Grunnar	1.200	1.200
Flutt frá undanfarnum árum	31.846	29.868
Flutt frá ársúrsliti	1.332	1.978
ginogn tilsa ans	**35.23**	**33.8**
uld tilsa ans	**3 2. 58**	**3 .293**
Tøl, sum ikki eru við í fíggjarstøðu		
Ábyrgdir o.a.	3.794	2.265

SUÐUROYAR SPARIKASSI

www.reproz.com

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 30. mai 2002 samtykti, at vegirnir í Kollafirði, sum ikki hava navn, koma at eita:

Norðuri í Sundum
á Kjalnesi
á Miðgerði
á Todnesi
í Homrum
við Sjógv
í Líðini
á Lygnnesi
á Langasandi
Inni í Firði
Frammi í Dali
á Oyrareingjum
á Signabø

SNARSKIVAN

Leiðari til Frítíðarskúlan í Vági

Søkt verður eftir leiðara til nýstovnaða frítíðarskúla hjá Vágs Kommunu.

Stovnslýsing
Frítíðarskúlin heldur til í Vágs Skúla.

Starvið
Vit bjóða eitt starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum, har leiðarin millum annað kemur:

- At standa fyri tí umsitingarliga og námsfrøðiliga partinum viðvíkjandi stovninum.
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum.
- At leiðarin hevur eitt tætt samstarv við aðrar stovnar og umsitingina hjá Vágs Kommunu.

Førleikakrøv
Neyðugt er, at umsøkjarin hevur pedagogiska útbúgving, kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í sínum arbeiði. Eisini er neyðugt at hava innlit í umsiting. Dentur verður lagdur á, at leiðarin kann skapa eitt gott samstarv millum stovnin, børn og foreldur.

Setunarviðurskifti
Starvið, ið er 3/4 tíð, verður sett frá 15. august 2002 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmálanum millum Føroya kommunala arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag ella við avvarðandi fakfelag.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 373024.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. juli 2002. Merk umsóknina »Leiðari«.

Vágs Kommuna
Mentunarnevndin

máling & gólv

WICANDERS
SLITSTERKT STAVPARKETT OG PLANK
*CORKLOC
(skal ikki límast)

CORKLIFE
Eitt lakerað tundurgólv, ið verður álagt eftir Corkloc mátanum

Eisini hava vit tundurflísar við vinyl slitlag

máling & gólv
við Landavegin
Tlf. 316066

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu.

Deildin er bindilið millum borgaran og tær tríggjar fyrisitingarnar: Miðfyrisitingina, Teknisku fyrisitingina og Trivnaðarfyrisitingina.

Arbeiðsøkið, ið Snarskivan røkir, er tænasta í breiðari merking til starvsfólk og borgara.

Snarskivan heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn. Avgreiðslan er saman við postverkinum í gamla posthúsinum.

www.torshavn.fo

Starvsfólk við byggitekniskum kunnleika til Snarskivuna

Tekniska økið í Snarskivuni leitar eftir eldhugaðum starvsfólki

Tað er tær vit leita eftir, um tú
- ert ágrýtin, kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka ábyrgd
- hevur áræði til at menna tekniska økið við mongu fjølbroyttu arbeiðsuppgávunum
- hevur hegni til at vegleiða og ráðgeva borgarum og vinnurekandi
- hevur førleika í føroyskum
- hevur royndir við at nýta teldu

Uppgávurnar á tekniska økinum
Umframt at virka sum bindilið millum Byggideildina, Teknisku deild og Snarskivuna, verður uppgávan at menna tekniska økið í Snarskivuni, so Snarskivan m.a. gerst før fyri at:
- ráðgeva og kunna um almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtyktirnar
- ráðgeva um sethúsabygging tvs. byggiloyvi, byggistig, nettonýtslustig, kloakkviðurskifti, vatnviðurskifti, garðskyldu o.a.
- kunna um størri útstykkingar
- veita smærri byggiloyvi, tað er byggiloyvi til m.a. garagu, bilskýli og hjall
- útflýggja kort frá FDS-skipanini
- gera mannagongdir og savna kunnandi tilfar til faldarar

Sum tíðin frálíður verður miðað ímóti, at tú hevur eina breiða vitan um tekniska økið.

Setanarviðurskifti
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

Ynskir tú at vita meiri
set teg í samband við Mourist Mouritsson, deildarleiðara, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa.

Umsóknin
Umsóknin skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 30. juni. 2002
Viðmerk "Snarskivan" á umsóknina.

Postboðavloysari í Kollafirði

Lýst verður eftir avloysara at ganga við posti í Kollafirði.
Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna.

Sjálv avloysingin verður frá 15. juli fram til endan av september mánaði, men viðkomandi má byrja skjótast gjørligt til upplæring.

Løn og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Umsókn verður at stíla til:
Postverk Føroya
Postboks 3009
110 Tórshavn

Grundstykki í Havn til sølu

Ognin, mat. nr. 724h, á Traðarbrekku í Havn, verður við hesum lýst til sølu.

Stykkið er 534 m2 til støddar, liggur mitt í býnum og gott útsýni er yvir býin vestureftir.

Áhugað kunnu ringja á telefon 31 29 63 eftir kl. 16.00 ella á 25 73 26.

Handilslærlingur til Ítróttarhandil

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber. Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðsla, prísmerking/útpakking av vøru, móttøka og avgreiðsla av ordrum.
Tað er eisini møguleiki fyri at næmingurin kemur at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin 3 ferðir 14 dagar á skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, møtir til tíðina, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postsmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin -tað loysir seg